# Statoil stóri sigursharrin

**Tað er ikki ov nógv sagt, at norska oljufelagið Statoil gjørdist stóri vinnarin í 2. útbjóðingini á landgrunninum. Statoil er við í meira enn helvtini av loyvunum og tykist við hesum at vera vorðið veruliga lokomotivið í oljuleitingini við Føroyar**

2. ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*

– Vit eru væl nøgd í Statoil. Vit hava sum so fingið tað vit fóru eftir í 2. útbjóðing sigur Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil, sum má sigast at vera veruligi vinnarin í útbjóðingini, nú felagið er við í ikki minni enn fýra av teimum sjey loyvunum, sum eru latin. Í trimum førum er Statoil fyristøðufelag, operatørur og í einum føri er tað í bólki saman við ChevronTexaco, Dong og OMV.

Við úrslitinum av hesum umfarinum má sigast, at norska oljufelagið er eitt tað mest virkna á Føroyaøkinum og tískil drívandi megin í lokomotivinum. Rúni Hansen sigur, at felagið leggur stóran dent á kanningarnar á landgrunninum og vísir samtíðis á, at tað hevur ikki gjørt støðuna verri her, at Statoil keypti seg inn í eitt loyvi í bretskum øki, sum nú helst vísir seg at vera eitt oljufund. Hann útilokar heldur ikki, at nettupp tað fundið kann fáa týdning fyri víðari gongdina á Føroyaøkinum. Tað hevur í hvussu er gjørt sítt til, at áhugin fyri 2. útbjóðing var so mikið stórur. Tað vísir seg eisini, at øll feløgini, sum eru við í fundinum í bretskum øki, eru at finna aftur í føroysku útbjóðingini. Somu feløg søktu nevniliga um økið okkara megin markið og fingu loyvið her.

Uppá fyrispurning hvussu tað ber til, at felagið hevur søkt einsamalt um tvey leitiloyvi sigur Rúni Hansen, at vanliga roynir tú í sambandi við at bora ein brunn at býta váðan, men í hesum førinum bar tað so á, at vit mettu tað vera best at vera einsamallir og kunnu harvið menna økini, áðrenn vit so møguliga seinni kunnu fara út og bjóða øðrum feløgum uppí í samband við at bora brunn. Um tað fer at koma so langt.

Hvat heldur Statoilstjórin um, at tvey nýggj feløg sum ChevronTexaco og OMV nú eru komin inn á Føroyaøkið!



*Henda myndin talar fyri seg. Statoil er vónin á Føroyaøkinum, nú felagið er tað mest virkna oljufelagið á landgrunninum*


*Rúni Hansen, stjóri í Statoil hevur alla orsøk til at smílast, nú Statoil hevur fingið tillutað heili fýra leitiloyvi av teimum sjey. Her er hann á veg við umsóknunum til Oljufyrisitingina. Stjóri Sigurd í Jákupsstovu tekur ímóti tí altíð vælupplagda fuglfirðinginum*

*Mynd Jan Müller*



*Oljuleiting við Føroyar má sigast at vera komin á eitt vegamót, nú 2. útbjóðing hevur verið og varð almannakunngjørd seinnapartin mánadagin. Áhugavert er í hesum sambandi at kaga í Sosialin fyri umleið 30 árum síðani, tá fyrstu útmeldingarnar komu um oljuleiting. Eitt amerikanskt oljufelag bað um loyvi til at gera seismiskar kanningar við Føroyar*

## Úrslitið av 2. útbjóðing

### Loyvini, ið eru latin, eru hesi

**Loyvi nr. 008**
**ChevronTexaco 40%**
**Statoil 30%**
**Dong 20%**
**OMV 10%**

**Loyvi nr. 009**
**Statoil 50%**
**Shell 20%**
**Dong 20%**
**Føroya Kolvetni 10%**

**Loyvi nr. 010**
**Statoil 100%**

**Loyvi nr. 011**
**Statoil 100%**

**Loyvi nr. 012**
**Føroya Kolvetni 100%**

**Loyvi nr. 013**
**Geysir 60%**
**Atlantic Petroleum 40%**

**Loyvi nr. 014**
**Geysir 60%**
**Atlantic Petroleum 40%**